## VEÐRIÐ




**Í dag**
Andøvsgul til strúk í vindi av eystri, 8-13 m/s. Skýggjað og sirm. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Komandi dagarnar**
Andøvsgul til strúk í vindi av landssynningi, 8-13 m/s. Í løtum upp í hvassan vind, 15 m/s. Skýggjað, tám og ælaveður. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Ein maður koppaði stórbanka

**Útsagnirnar hjá einum búskaparfrøðingi í Hollandi hevur nú gjørt, at bakin fór á heysin. Nú væntar honum eitt stórt sakarmál**

BANKASKRÆDL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




- Um tit eru ónøgd við órættaðu yvirprísirnar hjá DSB upp á bústaðarlán, taki so peningin út sum mótmæli.

Nøkulunda soleiðis ljóðaði ráðið frá búskaparfrøðinginum Pieter Lakeman í niðurlendskum sjónvarpi í bestu senditíð tann 1.oktober.

Tað úrslitaði í einum »run« á niðurlendska DSB Bank, sum upp á bert 11 dagar merkti, at kundarnir tóku ein sættapart av teimum 33 milliardum krónunum, sum bankin hevði innistandandi.

### Deyðsorsøk

Tað gjørdist deyðsorsøkin hjá bankanum, sum varð koyrdur í gjaldssteðg í gjár. Nú bíðar eitt møguligt sakarmól móti Pieter Lakeman afturfyri. Bæði miðbankin og niðurlendski fíggjarmálaráðharrin hava mælt kreditorunum til at royna seg við einum sakarmáli móti Lakerman, men hann er ikki ræddur av hesum.

Sambært Lakeman var skrædlið ikki til at koma uttanum, og at miðbankin hevur misrøkt sína skyldu, av tí at hann hevur verið vitandi um trupulleikarnar hjá DSB í meira enn eitt ár.

Felagið hjá Lakeman umboðar kundar, sum eru komnir í fíggjarligt óføri orsakað av yvirprísum upp á bústaðarlán. Hann er harafturat formaður í einum stuðulsgrunni fyri fólk við truplum bústaðarlánum.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | --- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 14 |
| Madrid | -- |
| Róm | -- |
| Malorca | -- |
| Athen | 23 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Veðurlagið**
Eitt látrýst, 975, hPa, vestan fyri Írland flytur seg spakuliga í ein landsynning.

Lýggj og slævin luft streymar yvir Føroyar av landsynningi. Mikudagin nærkast eitt brúgvalag av suðuri.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/10 kl. $06^{00}$ – 13/10 $06^{00}$. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 12/10 kl. $06^{00}$ – 13/10 $06^{00}$.
Avfallið higartil í oktober: 93 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 13. okt | Mánin næstur jørðini |
| 18. okt | Tendring |
| 25. okt | Mánin longst frá jørðini |
| 26. okt | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. okt | 08:43 | 21:08 | 07:43 | 20:08 | 07:58 | 20:23 | 10:43 | 23:08 | 11:43 | - | 06:58 | 19:23 | 05:58 | 18:23 | 08:58 | 21:23 | 09:58 | 22:23 | 08:28 | 20:53 | 09:43 | 22:08 |
| 21. okt | 09:34 | 22:00 | 08:34 | 21:00 | 08:49 | 21:15 | 11:34 | - | 00:08 | 12:34 | 07:49 | 20:15 | 06:49 | 19:15 | 09:49 | 22:15 | 10:49 | 23:15 | 09:19 | 21:45 | 10:34 | 23:00 |
| 22. okt | 10:26 | 22:52 | 09:26 | 21:52 | 09:41 | 22:07 | 00:00 | 12:26 | 01:00 | 13:26 | 08:41 | 21:07 | 07:41 | 20:07 | 10:41 | 23:07 | 11:41 | - | 10:11 | 22:37 | 11:26 | 23:52 |
| 23. okt | 11:17 | 23:42 | 10:17 | 22:42 | 10:32 | 22:57 | 00:52 | 13:17 | 01:52 | 14:17 | 09:32 | 21:57 | 08:32 | 20:57 | 11:32 | 23:57 | 00:07 | 12:32 | 11:02 | 23:27 | - | 12:17 |
| 24. okt | - | 12:07 | 11:07 | 23:31 | 11:22 | 23:46 | 01:42 | 14:07 | 02:42 | 15:07 | 10:22 | 22:46 | 09:22 | 21:46 | - | 12:22 | 00:57 | 13:22 | 11:52 | - | 00:42 | 13:07 |